# Tróndur í Gøtu næstan seldur



Russar og kinesarar hava hug at keypa nóta- og trolskipið Trónd í Gøtu. Í dag fer Tróndur í Gøtu í dokk á Skála, so keypararnir kunnu hyggja nærri at skipinum, skrivar Dimmalætting. Jákup Jacobsen, reiðari, sigur við blaðið, at teir vóna at fáa ein sølusáttmála upp á pláss í hesum mánaðinum. Reiðaríið í Gøtu fær nýtt skip um ársskiftið, og tað kemur í flotan fyri Trónd í Gøtu. Skrokkurin til tað nýggja skipið er bygdur í Póllandi, og skipið verður gjørt liðugt í Danmark. Tróndur í Gøtu er bygdur í Noregi í 1986.

# Fíggjarvánir tarna Klaksvíkar Søgu

Klaksvíkar kommuna boðar nú frá, at vegna broyttu fíggjarligu fortreytirnar verða útgávurnar av bind II og III seinkaðar nakað í mun til uppruna ætlanina, men framvegis verður arbeitt miðvíst, og ætlandi verður bind II á gøtuni til jóla í 2009. Hans Andrias Sølvará, søgufrøðingur, sum er ritstjóri fyri „Klaksvíkar Søgu“, er komin heilt væl áleiðis við skrivingini av bindi II. Í farnu viku var fundur millum ritstjóran og ritstjórnina, sum, umfram rithøvundan sjálvan, er mannað av fylgjandi persónum: Jógvan Ravnsfjall, Finnur Kjølbro, Kristinbjørg Høgnesen, Jóannes Hansen og Dáva Winther, sum vantar á myndini Ætlanin er, at næsta bindið av „Klaksvíkar Søgu“ skal verða liðugt skrivað 1. juli. Síðan er rættskriving, uppsetingar- og prentingararbeiði at taka upp eftir summarsteðgin, og verður bind II av Klaksvíkar Søgu vónandi á gøtuni undan jólum í ár. Samlaða verkið fer at fevna um trý bind



*Nebbasildin svimur næstan upp á land. Hesar nebbasildirnar kundu veiðast við sílatráðu og lítlum sílapilki í Sandágerði í gjárkvøldið. Kirstin Eliassen, lívfrøðingur á Havstovuni, sum skrivar phd-verkætlan um nebbasild, sigur, at útlitini í havinum eru rættiliga góð í løtuni*

*Mynd: Vilmund Jacobsen*

nógv nebbasild er.

Kirstin Eliassen sigur, at tá tey vóru úti við Magnusi Heinason í apríl og skuldu taka nakrar livandi nebbasildir heim við til Sjósavnið á Argjum, komu tey nærmast í rasshaft av nebbasild.

- Vit høvdu tilsamans 16 tóv á átta støðum, har vit fingu nebbasild á teimum øllum. Tað eina tóvið, sum bert vardi í ein hálvan tíma, gav heili 5 tons av nebbasild. So, hetta var nógvar ferðir meira enn tað, sum vit høvdu brúk fyri til Sjósavnið, sigur hon brosandi.

Hon sigur, at tað næstan er ógjørligt at gera stovnsmetingar av nebbasild, tí hetta er ein so serstakur fiskur.

- Nebbasildin er uppi í sjónum um dagin og grevur seg niður í sandin um náttina. Tá tað so líður út á heystið, grevur hon seg niður í sandin burturav, og har liggur hon so í dvala, til hon um nýggjársleitið – og í eitt lutfalsliga stutt skifti - kemur upp úr aftur sandinum at gýta. Síðan grevur hon seg niður aftur í sandin og kemur ikki uppaftur fyrr enn um mánaðarskiftið februar/ mars.

Kirstin sigur, at nebbasildin í so máta minnir um bjarnirnar, sum liggja í dvala um veturin.

- Hesa tíðina, meðan nebbasildin liggur í dvala í sandinum, er hon púrasta burtur í sjónum, og tá livir so fiskurin av aðrari føði í havinum.

Hon vísir á, at tað eisini er fiskasløg, sum grava niður í sandin eftir nebbasild í tíðini, tá hon liggur í dvala.

- Nebbasild gýtir tíðliga, og eggini liggja klistraði í sandinum, meðan tey búnast. Við tað, at gýtingin fer fram um ársskiftið, hevur tað stóran týdning fyri eitt nú nebbasildastovnin, at gróðurin í havinum kemur tíðliga um árið, leggur Kirstin Eliassen aftrat.

### Ein onnur søga

Havfrøðingurin veit eisini eina aðra áhugaverda søgu at siga, nú vit umrøða nebbasild og støðuna hjá hesum fiskaslagi, sum hevur so stóran týdning fyri lívsgrundarlagið hjá kki minst toski og sjófugli.

- Nakað eftir, at Magnus Heinason rendi seg í stóra hálið av toski norðanfyri, tá fyrru yvirlitstrolingarnar vórðu gjørdar í vár, vóru vit norðanfyri við einum pinkalítlum nebbasildatroli við 5 mm. meskum í trolposanum. Hetta var miðskeiðis í apríl mánaða. Vit høvdu ongan ís umborð á skipinum, men tá hetta lítla trolið kom at borði, vóru millum hálvt annað og tvey tons av toski í. Hetta hevði eg slett ikki roknað við.

Hon sigur – enn einaferð brosandi – at tey noyddust beina leið til lands at landa toskin og taka ís.

- Tá vit komu útaftur á leiðina, var sama skil, og vit komu snøgt sagt í rasshaft av toski, leggur hon aftrat.

Vit spurdu eisini Kirstin Eliassen, nú vit høvdu hana í telefonini í morgun, hvørji útlit hon heldur eru til betri toskaveiði, sum tíðin gongur.

- Jú, eg haldi, at náttúruviðurskiftini síggja spennandi út í løtuni, og tað skal vera undarligt, um ikki okkurt gott fer at spyrjast burtur úr hesum. Alt veldst jú um, hvørt góðu vánirnar fara at halda fram, tí treytin fyri vøkstri og trivnaði í havinum er, at vit fáa nøkur góð ár – í fyrsta lagi til gróður og soleiðis plantæti, sum aftur er grundarlagið undir øllum øðrum lívi í havinum, sigur lívfrøðingurin.